# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jógvan heiðraður

**Kringvarp Føroya skipaði fríggjadagin 15. januar fyri móttøku í sambandi við at Jógvan Arge útvarpsmaður hevur starvast á stovninum í 40 ár**

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Kendi frásøgumaðurin í Kringvarpinum, Jógvan Arge, varð heiðraður við móttøku fríggjadagin í sambandi við at hann hevur starvast 40 ár á stovninum. Nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á Jógvan hendan dagin, starvsfelagar, familja, vinir og kenningar, og fleiri røður vórðu hildnar. Tey sum hildu røðu vóru millum onnur kringvarpsstjórin Annika Mittún Jacobsen, Rúni Heinesen, formaður í kringvarpsnevndini, og starvsfólkini í Kringvarpinum Solby Eliasen og Suni Merkistein. Eisini helt Jógvan sjálvur røðu.

Millum føroyingar er Jógvan er helst best kendur fyri sínar frásagnir frá t.d. kappróðri og fótbóltsdystum, umframt at hann eisini er kendur sum rithøvundur. Hann hevur m.a. skrivað ymisk minnisrit og bøkur um føroyingar í Grønlandi.

Eftir at Jógvan varð liðugur við sína útbúgving sum journalistur á Ritzaus Bureau í Keypmannahavn, byrjaði hann sum programmedarbeiðari í Útvarpi Føroya 1. januar 1970. Frá 1979-1989 var hann leiðari fyri tíðindadeildina, og eftir tað var hann programleiðari á stovninum til 2008.



*Kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen, handar Jógvani ein málning gum gávu frá Kringvarpinum*



*Jógvan og mamman, Petra, og konan Marita Arge*



*Jóannes Ejdesgaard, fíggjarmálaráðharri, heilsar upp á Jógvan*



*Starvsfelagarnir Suni Merkistein og Jógvan Arge*

## Dagurin

**18. januar. Prisca.** Ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir. Gomlu jól enda, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum. Dagurin verður eisini róptur gamli trettandi. Vilt tú verða ríkur, skal tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt. Magnus Heinason varð hálshøgdur hendan dagin í 1589.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

## Tøkk

Hjartaliga tøkk til øll tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri bróðir

**Elias Karl Petersen**
fyrrverandi lærari,
Sandavági

doyði og varð jarðaður.

Somuleiðis ein tøkk til tykkara, sum hava latið peningagávu til Meinigheitshúsið í Sandavági.

*Familjunnar vegna*
**Brøðurnir**

## Merkisdagar

**70 ára føðingardagur**
19. januar verður Finn í Puntabyrgi, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin saman við teimum nærmastu.

**Diamantbrúdleyp**
28. jan. kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 30. jan., kl. 16, har øll eru vælkomin. Fólk verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 23. jan. á tlf. 444092.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 26. feb. hava hjúnini Heinina og Sigurd Gaard Hansen diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 27. feb. í Royndarhúsinum í Nólsoy. Tey, sum vilja gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 327145 ella 527145 innan 7. feb.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 23. jan. kl. 15 giftast í Hoyvíkar Kirkju Tóra Simonsen, Saltangará, og Herbert í Lon Jacobsen, Hoyvík. Vælkomst verður heima við hús frá kl. 19, har øll eru hjartaliga vælkomin.